## Løgin Beatles akkord

Tónleikarar, matematikarar og onnur hava í meira enn 40 ár roynt at koma til botns í, hvør byrjunarakkordindin í víðagitna Beatles sanginum »A Hard Day's Night« er. Akkordin, ið verður spæld fyrst er samansett av fleiri ljóðførum, men fremst er 12-streingjaði gittarin hjá George Harrison. Fleiri hava roynt, men áðrenn Jason Brown kunngjørdi úrslitið av síni fýra ára longu kanning, hevur tað ikki verið vist hvørjir tónar vóru nýttir. Tað vísti seg, eftir at hava nýtt støddfrøði og telduviðgerð, at George Martin sat við klaverið og gjørdi sítt ítaast til hesa løgnu akkord.



# Nýggja stjørnuskotið í Havn

**Bogi Andreasen er eitt nýtt andlit í politikki, hóast hann er klaksvíkingur eydnaðist tað honum at fáa 489 atkvøður í Tórshavnar kommunu og harvið næst flestar til valið í gjár. Samgongan er skipað og Bogi Andreasen hevur fingið varaborgarstjórasessin. Hjartamál hansara eru trivnaður, Miðbýurin og Hoyvíkin**

BÝRÁÐSVAL
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*



*- Uttan bakland hevði tað ikki borið til. Konan hevur alt at siga, og uttan hennara stuðul hevði hetta ikki latið seg gera, sigur Bogi Andreasen, sum er nýggjur varaborgarstjóri í Tórshavnar Kommunu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Stórsta nýggja andlitið í býráðnum á hesum sinni er Bogi Andreasen, sum ikki áður hevur verið sjónliga virkin innan politikk. Tað eydnaðist honum tó at fáa fleiri atkvøður enn bæði Leivur Hansen og Jógvan Arge, sum eisini stillaðu upp á Tjóðveldislistanum.

- Eg hevði als ikki væntað at fáa so nógvar atkvøður, segði hann skelkaður og glaður. – Eg vónaði at koma inn, at júst koma um markið og harvið koppa inn. Vónaði at koma inn, ikki tí eg bara vil í býráðið, men tí eg brenni veruliga fyri mínum málum.

Orsøkina til megnarvalið hjá honum, metti hann vera, at hann er ein kend persónligheit á mentanarpallinum í Havnini. Umframt at vera leiðari á Margarinfabrikkini seinastu fimm árini, hevur hann skipað fyri stórum konsertum, sum til dømis Bryan Adams og Asfalt. Eisini hevur hann orð á sær, um at duga at fáa mál framd í verki, meira enn bara at tosa um tey.

### Nógv á skránni

Sum varaborgarstjóri hevur hann ætlanir fyri framtíðina, fyrst á breddanum standa hansara hjartamál, ein nýggj miðbýarætlan, Hoyvíkin og trivnaður fyri øll. Men hóast hjartamál hansara snúgva seg um Havnina verður útjaðarin í kommuni ikki gloymdur, leggur hann afturat.

Sjálvur er hann sera væl nøgdur við samstarvið við Javnaðarflokkin. Hann metti tað vera fullkomiliga náttúrligt at halda fram har seinasta samgongan slepti. Javnaðarflokkurin, við Heðini Mortensen á odda, var nógv hin størsti, tí hevði tað ikki verið rætt at skipað eina samgongu uttanum hann.

Tað stóð Tjóðveldisflokkinum í boði at fara í samgongu saman við Fólkaflokkinum, har hevði Bogi Andreasen verið hann, ið hevði fingið flestar atkvøður og verið upplagdur borgarstjóri.

- Víst eru nógvir møguleikar, men tað hevði ikki verið rætt at farið burtur frá Javnaðarflokkinum. Eg má kunna síggja meg sjálvan í andlitið eftir hetta. Býráðið eru jú fyrimyndir hjá borgarunum, sum hava valt okkum, tí ber ikki til at gera slíkt fyri at fremja seg sjálvan, sigur Bogi Andreasen.

### Baklandið

- Uttan bakland hevði tað ikki borið til. Konan hevur alt at siga, uttan hennara stuðul hevði hetta ikki latið seg gera, sigur hann. Hann leggur afturat, at hann hevur ein stóran vinaskarða, ið hevur staðið aftanfyri hann og stuðla honum gjøgnum alla hesa tíðina.

Pápi hansara sat seinasta skeið í býráðnum í Klaksvík fyri Fólkaflokkin, men tað eydnaðist honum ikki at vera valdur inn á hesum sinni.

- Eg ringdi til hann í nátt og hann varð sera errin, sigur Bogi Andreasen við einum smíli. At familjan og onnur standa aftanfyri seg, hevur ómetaliga stóran týdning fyri hann.

### Í býráðið

Hvussu gerandisdagur hansara fer at síggja út komandi tíðina, ánar hann als ikki. Hann greiðir frá, at alt er so nýtt og spennandi. Í hesi vikuni fara samráðingarnar fram, um hvussu samgonguskjalið skal síggja út.

- Eg havi fingið ótrúliga nógv sms boð, har fólk eru komin við áheitanum og stuðli, men enn kann eg einki lova, men samstarvið millum partarnar eru gott, sigur hann.

# Oddfríður Marni Rasmussen við nýggjari barnabók

**Oddfríður Marni Rasmussen kann nú eisini nevna seg barnabókarithøvund, nú hann gevur út bókina Innantanna Anna og Túsundbeinið Súni**

NÝGGJ BÓK

Við sínum sermerkta skrivistíli og humor sigur Oddfríður M. Rasmussen hesuferð søguna um puddilhundin Annu, sum altíð hevur verið tigandi, og um túsundbeinið Súna, sum er alt annað enn tigandi.

Súni er skrappur og arbeiðir nógv, hann er sjálvstøðugur vinnurekandi, sum rithøvundurin tekur til, so hann er altíð á fleggj og hevur ovmikið at gera, ikki um at tala, tá ið hann kemur til hús í ruskveðri og skal turka stivlar og hosur á radiatorinum.

Men sjálvt um Súni er skrappur, so er hann góður við vinkonu sína Annu, og tá ið Anna ein dagin er komin í neyð, tí hon knappliga er farin at tosa, so traðkar Súni sjálvandi til og hjálpir henni burtur úr fløkjuni, sum er um at gera Annu í ørviti.

Tey bæði fara á eina ferð út um portrið og hitta nógv onnur stuttlig og sermerkt djór, sum øll hava sína søgu, og sum hjálpa teimum báðum víðari fram móti eini loysn á málinum.

Bárður Oskarsson eigur tekningarnar i bókini.

Innantanna Anna og Túsundbeinið Súni er 60 blaðsíður, í litum og innbundin. Tað er Bókadeildin, sum gevur út.




*Bárður Oskarsson eigur tekningarnar í nýggju barnabókini hjá Oddfríður M. Rasmussen*

*-ave-*